# Kundaráðgevi við dagligari leiðslu

Vilt tú hava ábyrgd av at røkja sambandið við 20 prosent av kundum okkara í høvuðsstaðnum?

Eik



**Framsøkin og samstarvandi**
Eik sóknast eftir dagligum leiðara til deildina í Hornabø. Umframt dagligu ábyrgdina av deildini, verður tú eisini kundaráðgevi.

Tín leiklutur krevur samstarv og rættar avgerðir. Roknast kann við spennandi avbjóðingum og ávísum arbeiðstrýsti.

Í starvinum sum kundaráðgevi verður dentur lagdur á heildarráðgeving og sølu.

**Tínir eginleikar**
- Tú ert jalig/ur og uppsøkjandi
- Tú dugir væl at samstarva
- Tú hevur dirvi
- Tú ert proaktiv/ur
- Tú hevur peningastovnsútbúgving ella líknandi útbúgving

Starvið verður sett skjótast møguligt, og umsóknarfreistin er 22. jan. 2007 kl. 12.00. Løn sambært avtalu.

**Tosa við**
Sæunn L. Petersen,
varaleiðara í Tórshavn,
tel 348020,
saunn.petersen@eik.fo

**Les meira um starvið á**
www.eik.fo

petur & petur 320 780

KRINGVARP FØROYA

# Serviceteknikari

Søkt verður eftir serviceteknikara til Kringvarp Føroya.

## Starvið

Tann, ið settur verður, skal m.a. taka sær av:

- Umvæling og viðlíkahaldi av tøkniligari útgerð, t.d. til ljóð, video, fylgisvein og tráðleyst samband.
- Verkseting av nýggjari tøkni.
- Ymsum video- og ljóðtøkniligum innleggingum.

## Tínir førleikar

Tú ert útbúgvin radio- ella elektronikkmekanikari og hevur innlit í video-, ljóð- og RF-tøkni. Fyrimunur er at hava praktiskar royndir. Tú hevur kunnleika um talgilda tøkni, og fyrimunur er eisini at hava skil fyri KT-útgerð. Tú arbeiðir bæði sjálvstøðugt og í toymi, og tú ert røkin, fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni. Skeivar arbeiðstíðir kunnu koma fyri.

## Fleiri upplýsingar

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Hans Andor Johannesen, tøkniligan leiðara, á telefon 34 75 72 ella 34 75 00.

## Vit kunnu bjóða

Eitt spennandi arbeiði við skiftandi uppgávum á einum góðum arbeiðsplássi. Eitt starv, ið gevur tær møguleikar fyri støðugari menning í sjónvarps- og útvarpstøkni. Møguleikar eru eisini fyri skeiðum uttanlands, har tú lærir um nýggjastu tøknina á økinum.

## Setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

## Umsóknir

Umsóknir til starvið skulu vera Kringvarpi Føroya í hendi í seinasta lagi 2. februar.

REPROZ

Kringvarp Føroya Norðari Ringvegur Postboks 1299 FO-110 Tórshavn Tel.: + 298 34 75 00 Faks: + 298 34 75 01 www.kringvarp.fo